# Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 29. oktober 2025, kl. 17.00

| | |
|---|---|
| **Møtt á fundi:** | Sára Jógvansdóttir, Anja Haldansen, Jákup S. Jóanesarson, Fróði Skúvadal, Karl A. Olsen, Janus A. Jensen og Pauli Magnussen |
| **Skrivari:** | Sólvit Nolsø |

Fróði Skúvadal møtti á fundi fyri Símun Jákup Højsted, sum hevði boðað frá, at hann ikki møtti. Áðrenn fundin bað borgarstjórin um at fáa mál nr. 70 tikið av skrá, tí tað av misgáum var á skrá. Tað skal fyri fíggjarnevndini áðrenn bygdarráðnum. Tað var einmælt samtykt. Málið kemur fyri á einum seinni fundi. Kunnað var eisini um, at ætlanin við eykajáttanini til kirkjugarðin var broytt. Í staðin fyri, at tríggjar milliónir verða framfluttar til í ár, verður ein millión flutt aftur til 2026, tí arbeiðið verður ikki heilt liðugt í ár hóast alt.

**Mál 66: 2. viðgerð av eykajáttan til kirkjugarðin**
Bygdaráðið samtykti í november 2024 at útbyggja kirkjugarðin á Knúgvum. Articon vann útboðið og vildi átaka sær arbeiðið fyri uml. seks milliónir krónur.
Upprunaliga skuldi arbeiðið verða liðugt við ársenda, men nú er sannlíkt, at tað verur liðugt longu í oktober 2025.
Upprunaliga var ætlanin at verkætlanini skuldi rindast í tveimum: tríggjar milliónir í 2025 og tríggjar milliónir í 2026. Tá verkætlanin sannlíkt er liðug áðrenn tíð, mælir umsitingin til, at tær tríggjar milliónirnar, sum skuldu rindast í 2026, vera framfluttar í eykajáttan til 2025, so øll upphæddin fellur í ár. Hetta m.a. fyri at hava eina størri íløgujáttan til annað í 2026. Játtanin verur funnin í innistandandi hjá kommununi. Kommunan eigur átta milliónir á bók og aðrar fýra eru á veg inn. Mett verur, at kommunan klárar íløguna, uttan at aktivera kredittin aftur.
Fíggjarnevndin samtykti einmælt 10. september at fylgja tilmælinum frá umsitingini og játta eykajáttanina.

Bygdaráðið samtykti við 1. viðgerð tann 17. september at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini.

**Viðv. 66**
Málið var einmælt samtykt.

**Mál 67: 2. viðgerð av eykajáttan til gongubreyt**
Bygdaráðið setti 200.000 krónur av í ár at gera eina gongubreyt í Miðalsbrekku.
Tilboðið upp á verkætlanin er upp á 442.000 krónur. Tí kann ikki meir enn hálvt arbeiði gerast í ár við pengunum, sum eru settir av.
Umsitingin mælir til, at fíggjarnevndin í eykajáttan leggur 242.000 afturat í verkætlanina, so hon kann gerast liðug í ár. Fíggingin verður tikin av pengum, sum kommunan hevur innistandandi, tí ikki er nóg mikið av taka av á øðrum kontum.
Ein samd fíggjarnevnd atkvøddi fyri tilmælinum frá umsitingini á fundi 10. sept.

Eitt samt bygdaráð tók undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini við fyrstu viðgerð tann 17. september 2025.

**Viðv. 67**
Málið var einmælt samtykt.

**Mál 68: Marknaumskipan uttangarðs**
Umsókn um marknaumskipan. Eigararnir av matr. 70c (Sámal Joensen) og 210d (Tummas í Niðristovu Durhuus) søkja um marknaumskipan, har matr. 70c letur 1 gyllin uttangarðs Úti í Haga á Bjørgum (matr. 358) til matr. 210d.

Tekniska nevnd hevur viðgjørt málið á fundi 6. oktober, og mælir bygdarráðnum til at viðmæla umsóknina.

**Viðv. 68**
Málið var einmælt samtykt.

**Mál 69: Ferðslusonur og ferðavmarkingar**
Vestmanna bygdarráð samtykti í sept. 2024 at gera alla Vestmanna bygd til eitt 40 km/t øki. Samskifti hevur síðan verið millum kommununa, Landsverk, løgregluna og ein ráðgeva um málið. Uppskot er nú klárt frá Mikkel Frandsen frá Ráð (ráðgevandi verkfrøðingi) til skelting. Talan er um eitt bland av 40 og 30 km/t.

Tekniska nevnd hevur umrøtt málið á fundi 6. okt og mælir bygdarráðnum at taka undir við uppskotinum, men at strika sonurnar á Leitisvegi og á havna- og vinnuøkinum Inni á Fjørð.

**Viðv. 69**
Málið var einmælt samtykt.

**Mál 70: Umsókn at keypa Kolastykkið**

**Viðv. 70**
Tikið av skrá. Kemur aftur á einum seinni fundi.

**Mál 71: Leigusáttmáli millum VA og VK**
Leigusáttmálin millum Vestmanna Arbeiðarafelag (VA) og Vestmanna kommunu um ognina á Bakkavegi 11 gongur út við ársenda.
Bæði VA og kommunan eru sinnaði at gera ein nýggjan leigusáttmála.

Í verandi sáttmála, sum kom í gildið í 2021, er leigan 6.500 krónur um mánaðin. VA hevur sagt týðiliga, at tey vilja ikki halda fram við somu upphædd. Tey løgdu út við at biða um 12.000 krónur um mánaðin. Grundgevingin var, at tey fara at leggja ognirnar hjá VA í ein grunn, og vildu hava, at tær skulu kasta pengar av sær. Tað gjørdu tær ikki í løtuni.

Uppskotið frá umsitingini var ein tvey ára sáttmáli, har leigan er 8.500 fyri árið og 10.500 seinna árið. Tað hevur VA góðtikið.
Umframt nýggjan leigusáttmála hevur umsitingin eisini tosa við VA um eitt møguligt keyp av húsunum. VA sigur seg vera sinnað at selja kommununi húsini, men tey vóru ikki sinnaði at koyra ein forkeypsrætt í sáttmálan. Tey fara undir at stovna grunnin, sum húsini skulu koyrast í, á aðalfundinum í november. Tá tey viðurskiftini eru skipaði, eru tey sinnaði at tosa við kommununa um eina sølu. Tey vilja, at húsini vera brúkt til endamál, sum koma øllum vestmenningum til góða. Tó siga tey eisini, at tey selja ikki húsini fyrrenn tey eru sýnaði og mett av húsameklara.

Fíggjarnevndin mælir bygdarráðnum til at taka av einum tvey ára sáttmála við leigu upp á 8.500 krónur fyrsta árið og 10.500 krónur seinna árið.

**Viðv. 71**
Málið var einmælt samtykt.

**Mál 72: Tænastugjøld á tóm hús**
Fíggjarmálaráðið hevur í kunngerð ásett hægst loyvda gjald, sum kommunur kunnu áseta á tóm hús í 2026 smb. lóg nr. 80 frá mei 2025 um tænastugjøld á tóm hús, sum kemur í gildið 1. januar 2026.

Hægst loyvda árliga gjald er ásett at verða 7945 krónur. Hægst loyvda mánaðargjald er 662 krónur. Grundarlagið undir útrokningini er §2 í lógini:

***§ 2.** Kommunustýrið ásetur tænastugjaldið. Tænastugjaldið skal hvíla í sær sjálvum og fevna um tær veruligu útreiðslurnar, sum kommunan hevur av vatnveiting, fráveiting av kloakk, burturbeining av húsarhaldsburturkasti og brunatilbúgving, sbr. tó stk. 3.*
*Stk. 2. Tær kommunur, sum krevja inn tænastugjald, skulu grunda útrokning av tænastugjaldinum á nøktandi og viðkomandi upplýsingar.*
*Stk. 3. Landsstýrisfólkið í fíggjarmálum ásetur í seinasta lagi tann 1. oktober í hvørjum ári eitt hámark fyri upphæddini á tænastugjaldinum í komandi álmanakkaári. Tænastugjaldið, sum kommunurnar áseta, má ikki fara upp um hámarkið, sum er sett av landsstýrisfólkinum í fíggjarmálum.*

Ein uppgerð frá mars 2025 vísir, at tað vóru 54 tóm hús í Vestmanna. Velur kommunan at áseta eitt tænastugjald, vildi inntøkan við hægst loyvda gjaldi verið 35.752,50 krónur um mánaðin og 429.030 krónur um árið. Tænastugjaldið skal setast út frá veruligu úteiðslunum, sum kommunan hevur av vatni, kloakk, renovasjón og sløkkiliðnum. Út frá fíggjarætlanini 2025 sæst, at samlaðu útreiðslurnar hjá kommununi til hesar greinar eru uml. 6 milliónir. Roknað út frá 400 húsum í Vestmanna (ein meting) brúka vit uml. 15.000 krónur pr. hús. Tí ber til hjá kommununi at taka hægsta gjald, skuldi kommunan valt at tikið eitt gjald.
Íløgur skulu eisini roknast upp í, tá gjaldið verður sett, men tær eru ikki við í hesi uppgerð. Tað er heldur ikki neyðugt, tí bara við rakstrarútreiðslunum er kommunan omanfyri hægstu upphædd.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi 9. oktober, og beindi málið víðari til bygdarráðið at taka støðu til.

**Viðv. 72**
Karl A. Olsen skeyt upp, at kommunan ikki setur tænastugjøld á tóm hús í 2026. Tað var einmælt samtykt.

**Punkt 73: Broyta reglugerðina fyri bátahylin**
Eftir áheitan frá Vestmanna Havn viðgjørdi vinnu- og havnanevndin á fundi 29. september broytingar í reglugerðini fyri bátahylin.

Nevndin mælir til at taka undir við broytingunum, og at umsitingin orðar hetta í reglugerðina.

**Viðv. 73**
Málið var einmælt samtykt.

**Mál 74: 1. viðgerð av eykajáttan til kirkjugarðin**
Í j.nr. 431002-2-2023, útbygging av kirkjugarðinum á Knúgvum, var í eykajáttan tann 10. september samtykt at framflyta tríggjar milliónir krónur til 2025, so øll verkætlanin var goldin í ár.

Ein partur av verkætlanini verður tó ikki liðugur í ár hóast alt. Millum annað nakrar gøtur og mold, sum má leggjast umaftur, tí ein partur er sjúnkaður. Tað skal gerast í mars 2026. Arbeiðstakararnir meta, at arbeiðið næsta ár kostar umleið eina millión krónur.

Umsitingin mælir bygdarráðnum til í eykajáttan at flyta eina millión krónur frá verkætlanini í 2025 og til 2026, tá arbeiðið gerst endaliga liðugt.

Samtykkir bygdarráðið tilmælið, broytist úrslitið í FÆ26 samvarandi eykajáttanini.

**Viðv. 74**
Málið var einmælt samtykt, og kemur aftur á komandi bygdarráðsfundi til 2. viðgerð.

**Mál 75: 1. viðgerð av FÆ26**
Uppskotið til fíggjarætlanina fyri 2026 skal viðgerast tvær ferðir av bygdarráðnum áðrenn 1. desember.

Hetta er fyrsta viðgerð av uppskotinum.

**Viðv. 75**
Einmælt samtykt og kemur aftur á komandi bygdarráðsfundi. Viðmerkt var eisini, at kostnaðirnir fyri innilokan av maskinhøllini og at breiðka vegin út á Grønanes, skulu greinast nærri.